## Innskriving av næmingum til forskúlan

Foreldur, ið ætla at skriva børn síni inn í forskúlan í Sankta Frans skúla skúlaárið 2006/07, verða vinarliga biðin um at boða skúlanum frá fyri 10. apríl 2006.

Arbeiðið í forskúlanum skiftir millum læring, menn-andi spøl og kreativt virksemi. Dentur verður lagdur á at geva børnunum góðar upplivingar, og at tey læra at samstarva og hava virðing hvørt fyri øðrum.

**Endamálið er m.a.:**
- At fyrireika barnið til at fara í skúla
- At menna barnið málsliga
- At geva barninum góðar upplivingar við leiki og skapandi virksemi
- At barnið lærir ymsar arbeiðshættir og at arbeiða í friðum og náðum
- At barnið mennist samsvarandi teimum evnum, tann einstaki hevur
- At virka fyri góðum samstarvi millum skúla og heim

**Sankta Frans skúli**
Varðagøta 10
Tórshavn
Tlf. 302530



**SØKT VERÐUR EFTIR ROYNDUM FORSKALLARA / ARBEIÐSMANNI AT BYRJA SUM SKJÓTAST**

**Eru nakrir spurningar, ring til Ragnar á tel 50 69 09**

**Skrivlig umsókn verður at senda til:**

**FORSKALLARIN**
**Postsmoga 1202**
**FO-110 Tórshavn**

## Dagrøktarar til Leirvíkar kommunu

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir dagrøktarum og møguligari hjálp, at byrja tann 1. mai 2006.

**Vit ynskja at tú**
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri.
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvs-feløgum.
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni.
- Ert tolin og vísir umsorgan.
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Í dagrøktarskipanini starvast 8 dagrøktarar og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 40.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktarnir ísenn við børnunum í fimleikarhøllini.
Arbeiðstíðin er ímillum 7.30-17.15. Lønin er sambært sáttmála við FA.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøktar-leiðara.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. apríl 2006.

Vinarliga send umsókn tygara til

**Leirvíkar Kommunu**
**Dagrøktarskipanin**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

## Krøv um skráseting av flogfenaði

Heilsufrøðiliga Starvsstovan áleggur øllum kommunum at skráseta flogfenað í kommununi, við heimild í §9 í djóraverndarlógini, løgtingslóg nr. 16 frá 23. februar 2001.

Nes kommuna heitir hervið á allar borgarar at skrá-seta sín flogfena, við at boða Nes kommunu frá hesum tlf. 447586 ella nes@nes.fo.

Skrásetingin fevnir um navn, bústað, slag og tal av flogfenaði.

**Nes kommuna**

## RØRSMIÐUR ELLA HANDVERKARI

Søkt verður eftir rørsmiðjum ella handverkarum at byrja skjótast gjørligt.
Vit vænta at tú arbeiðir skjótt og væl, ert álítandi og førur at arbeiða sjálvstøðugt.
Umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. verða at senda til:

Rør-tænastan
Postsmoga 1106
FO-110 Tórshavn



Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Eyðfinn Hansen á tel 22 81 80

rør-tænastan
Vatn-Hiti-Sanitet-Ventilatión

## Pedagogur/ stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðli til barnagarðin í Leirvík, at byrja 1. mai 2006.

Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðin hjá stuðlinum verður at stimbra einum barni motoriskt og annars vera um barnið í gerandisdegnum.

Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við familjuna.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur hóskandi útbúgving ella royndir.

Setan sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran, Gunnvu Thomsen á tlf. 743125.

Umsóknir saman við møguligum avritum av prógvi skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. apríl 2006.

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

## Lýsing frá Vágs Havn

Allir teir sum hava órudd liggjandi á økinum inni á Oyrunum verða bidnir um at beina tað burtur áðrenn 1. mai 2006.

Tað sum ikki er beint burtur nevnda dag verður beint burtur fyri eigarans rokning.

**Vágs Havn**

## Ársaðalfundur

Eigarafelagið Norðasta Horn hevur ársaðalfund tann 26. apríl 2006 kl. 20.00 í Býlingshúsinum. Skrá smb. lógum felagsins.

**Nevndin**
**Eigarafelagið Norðasta Horn**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo